# Tvørøkis eftirútbúgving í psykiatri

**Málbólkur**
Røktarar, sosial- og heilsuatstøðingar, pedagogar, sjúkrarøktarafrøðingar, ergo- og fysioterapeutar, sosialráðgevar og onnur, ið arbeiða ella fara at arbeiða innan hospitals-, økis- ella sosialpsykiatri umframt starvsfólk innan heimarøktina.

**Mál fyri útbúgvingini:**
Tvørøkis eftirútbúgvingin hevur til endamáls at geva luttakarunum møguleika fyri at dagføra vitan og arbeiðshættir sum heild innan psykiatriska økið, at økja um kompetansuna hjá tí einstaka skeiðsluttakaranum og at fáa innlit í og amboð til at arbeiða tvørtur um fakmørk og ráðsøki.

**Skipan og bygnaður**
Eftirútbúgvingin fevnir um 60 skeiðsdagar svarandi til 12 modul á 5 dagar á 6 tímar og fer fram í tíðarskeiðinum februar 2004 - juni 2005.
Kostnaðurin er 18.000 kr., sum kann gjaldast í tveimum pørtum.

**Minstukrøv fyri skeiðsluttøku**
- royndir við arbeiði við sinnisveikum og/ella áhugi fyri at arbeiða við hesum málbólki
- áhugi fyri at menna seg fakliga og persónliga
- áhugi fyri fakligari kunning, skrivliga og munnliga
- áhugi fyri at fara í djúpdina við ávísum spurningum í verkætlanararbeiði
- dagligi arbeiðsleiðarin innstillar og mælir til luttøku
- dagførda vitan svarandi til grundmodulið (skal kunna prógvast)

Tað er "Uddannelsesafdelingen, Psykiatrien i Århus Amt," í samstarvi við Psykiatriska Depilin á Landssjúkrahúsinum, ið skipar fyri.

Nærri upplýsingar um útbúgvingina fáast við at venda sær til skrivaran:
Inger M. Gabrielsen á tlf. 313540 lok 323, teldupostur: inmaga@lsh.fo
Tilmelding í seinasta lagi 5. januar 2004. Tilmeldingin er bindandi.

**Psykiatriski depilin**
leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur
Bergit Weihe
Landssjúkrahúsið
100 Tórshavn



# Hevur tú tað í tær?

Vit søkja eftir einum handilsnæmingi at byrja 1. januar ella skjótast tilber.

Vit leita eftir einum persóni, ið kann verða álitið í handlinum hjá okkum. Inn er ein virkin og væl umtóktur matvøruhandil við Streymin. Okkara dagliga virkið er at veita nærumhvørvinum eina fyrsta floks tænastu við dagligum vørum.

Inn bjóðar lærupláss í einum hvørvi, har tú umframt at læra tað grundleggjandi arbeiðið, at prísáseta, sýna vørur fram og veita eina góða tænastu, eisini fært innlit í ein heim, har arbeiðið er ein lívsstílur. Tað gongur við fúkandi ferð og tú trívist at fáast við fólk.

Sum persónur ert tú bæði íðin og virkin, og fortreytin fyri at tú fert at trívast, liggur í fatanini av, at tað einstaka viðskiftafólkið er okkara veruligi arbeiðsgevari.

Í lærutíðini fer ein partur av útbúgvingini fram í Danmark og tí er best um tú longu hevur staðið FHS útbúgving. Umsókn og viðkomandi skjøl skulu, innan 31. desembur, sendast til:

inn
við Streymin
Postsmoga 50
460 Norðskáli

inn

*Matvøruhandilin við Streymin*

*rekur handil við matvørum við herðslu á altíð at hava tað viðkomandi vøruúrvali, prísin og kundatænastuna.*

# Termodrakt

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

- Draktin til byggimeistarar, entreprenørar og sjómenn
- Luksus termodrakt.
- Bláar og svartar við endurskini



TILBOÐSPRÍSUR
**598,-**

Sosialurin 341800

# Tvingsilssøla

**Fríggjadagin**
**tann 16. januar 2004**
**kl. 9.30**

verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir smápartabrøv áljóðandi kr. 15.000,00 í Sp/f Marco Polo (AS 19/2002).

Tvingsilssølan er umbiðin av **Annfinn V. Hansen, adv., Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn, tlf. 319595 (j.nr. 101232)**, sum kann geva nærri upplýsingar.

Tvingsilssølutreytirnar kunnu umbiðjast frá nevnda advokati, ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 12. desember 2003*

# Limagjaldið fyri 2004

Limagjaldið fyri 2004 hækkar til 600 krónur um kvartali.

Limagjaldið fellur til gjaldingar í ávikavist januar, apríl, juli og oktober ársfjórðingi.

Mint verður á, at møgulig eftirstøða í hesum árinum, eigur at verða goldin áðrenn 31. desember 2003.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur · Telefon 449 212 · Telefaks 449 232
T-post adressa: sjkhil@post.olivant.fo

FAROE
LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi, adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

# Til sølu

**Sethús, matr. no. 599 á Toftum.**

Húsini eru o.u. 90 m² uttan, við stjørnutaki. Grundstykkið er o.u. 600 m² til víddar.

Miðhæddin er innrættað við duri, vásakøki, klædna- og kjøthjalli í einum lítlum útbygningi (17 m²). Í høvuðsbygninginum (73 m²) er gong, klædnarúm, køkur, stova, eitt størri og eitt minni kamar, bæðirúm við wc umframt eitt annað lítið wc.

Hjallarin, sum er í fullari hædd, er óinnrættaður.

Byggiárið er 1949 (útbygt 1980). Húsini standa yvir havnarlagnum mitt í bygdini. Tey eru væl hildin og í sera góðum standi.

Áhugað kunnu ringja á tel. 448502, 218502 ella 220625.

Sosialurin
*Lesið Sosialin - tað loysir seg*

www.sosialurin.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð um ognartøku

Sambært gr. 12,1 parti í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 20. november 2003 hevur samtykt at ognartaka til gerð av rundkoyring við Sundsvegur/Norðari Ringvegur hetta økið:

áleið 110 m² av matr. nr. 1410a, Tórshavn

Samstundis verður gjørt kunnugt, at sambært gr. 12,3 parti í nevndu lóg kann tann, ið eigur ognartikið økið, ella tann, ið hevur rættindi til tað, lata spurningin, um tað er neyðugt at ognartaka økini, koma fyri landsstýrið innan 3 mánaðir, aftan á at henda kunngerð hevur staðið í blaðnum.

SNARSKIVAN

LB SERVICE

## Sveisiarbeiði

Alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og aluminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði

LB-Service
v/Lars Bisgaard
tel 422127 / 220957

Sosialurin 341800

# Grundøki í Havn til sølu

Um nóg høgt boð fæst, verður grundøkið **á Skotarók 12**, matr. nr. 1234 h Tórshavn, til støddar 492 m² selt.

Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110
Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advokatfelagid@kallnet.fo

Tormóður Djurhuus, adv. Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv. Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv. Ingi Højgaard, adv.

# Lastbilar til sølu

Volvo FH12, 8x2 við veirheis, dumparalast við síðumatik og við HIAB 250-6 kran, ið kann takast av
Volvo F12, 8x4 við veirheis og 25 TM Palfinger krana
Volvo F12, 6x2 við veriheis og dumparalast
Volvo F10, 6x2 við veirheis og HIAB 175 krana
Volvo F10, 6x4 við vanligari last
Broyt X21 II

**Á Giljanesi Sp/f**
**Tlf. 21 98 99**

HJÁ GUNLEIVI

## Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt lærupláss leyst at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. procesteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 22 88 38 ella 31 21 61

## Bátur til sølu



LOCHIN 33
Árgangur 1979
Motorur: Iveco 400 HK - 2001
Ferð: 20 mil/t
Longd: 10 m.
Breidd: 3,7 m.
Dýpd: 1,8 m.

Verður seldur um hóskandi boð fæst við ella uttan fiskiloyvi.

Áhugaði kunna ringja tlf. 221463

*Gravarhjálp*
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
*Tel 311723 - 211723 - Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800

# Pedagogur/ hjálparfólk

**til Dagrøktina í Runavíkar Kommunu**

Søkt verður eftir pedagogi/hjálparfólki til Kommunalu Dagrøktina í Runavíkar Kommunu at arbeiða 30 tímar um vikuna, til setan 15. januar 2004, ella eftir avtalu.

Í Dagrøktarskipanini eru 90 børn og 21 dagrøktarmammur.

Vit ynskja at tú:
- hevur hug at arbeiða við børnum
- ert kreativur
- hevur góð samstarvsevnir

Arbeiðið verður í størstan mun at samskipa virksemið í spælistovuni.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá dagrøktarleiðaranum á tlf. 448594 ella á tlf. 228594.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 30. desember 2003.

Runavíkar Kommuna
**Dagrøktarskipanin í Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur
600 Saltangará

# Frítíðarskúlin í Sørvági

**søkir eftir einum deildarleiðara og einum hjálparfólki at byrja 15. januar 2004**

Frítíðarskúlin, sum er ein deild undir barnagarðinum Sýslan í Sørvági, søkir eftir einum deildarleiðara at arbeiða 35 tímar viku.

Deildarleiðarin, sum skal hava námsfrøðiligt prógv, hevur ábyrgdina av tí dagligu leiðsluni á frítíðarskúlanum.

Søkt verður eisini eftir einum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar viku.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Súsannu á Stongum, leiðara, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi seinast 1. januar 2004.

**Barnagarðurin Sýslan**
**FO-380 Sørvágur**

veitst tú ikki tað?